# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*25. juni fekk Nikolaj Haldansen Tjørnfelt eina systir. Hon vigaði 3860 gr., var 54 cm long og eitur Kaja Louisa. Foreldur teirra eru Anly og Karsten Haldansen Tjørnfelt, Langeskov DK.*



*6. september fingu Valborg og Atli Djurholm, Rødovre, ein son. Hann vigaði 2830 gr. og var 49 cm langur.*



*16. september fingu Eyðgunn Hansen og Hans Pauli W. Tórgarð, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 54 cm long og vigaði 4395 gr.*

11. september fingu Bergtóra Thomsen og Levi Mittelstein, Skopun, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

11. september fingu Heidi og Henrik Solberg, Trongisvági, ein son. Hann var 36 cm langur og vigaði 840 gr.

11. september fingu Barbara Rasmussen og Pætur S. Rasmussen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

12. september fingu Arnhild og Hans Bjarni Jacobsen, Esbjerg, tvíburar, dreingir. Annar var 48 cm langur og vigaði 2500 gr., hin 51 cm langur og vigaði 3200 gr.

12. september fingu Marjun og Einar Klakkstein, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

13. september fingu Brynhild og Jørmann Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2650 gr.

13. september fingu Barbara S. Norðbúð og Don Ey. Joensen, Innan Glyvur, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4100 gr.

14. september fingu Tove og Maison Bólstein, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

15. september fingu Ingun og Robert Langgaard, Runavík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4150 gr.

18. september fingu Mary M. og Poul M. Petersen, Skála, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

## Minningarorð um Johan Olsen, sjómanstrúboðara:

# Ein stríðsmaður farin

**f. 04.10.22 d. 18.08.03**



18. august andaðist fyrrverandi sjómanstrúboðarin, Johan Olsen í Rituvík, áttati ára gamal. Johan var ein kendur og virdur persónur í kirkju, heimamissións og sjómansmissións samanhangi.

Johan vaks upp í Rituvík, og fór sum flestu javnaldrar til skips. Við skipi undir Íslandi á ungum árum, var Johan fyri tí vanlagnu, at hann misti høgra arm. Ísland og íslendska fólkið kom eftir ta hendingina, at liggja honum tungt á hjarta.

Við einum armi var tað ikki lætt at vera sjómaður, og tí fór hann uppá land at arbeiða.

Johan giftist við Amy í 1951, og fingu tey fýra børn.

At lívið alt, skuldi verða ein tænasta fyri Jesus, stóð greitt fyri honum.

Eftir at hava verið á bíbliuskúla, byrjaði Johan sum sjómanstrúboðari hjá Føroysku Sjómansmissiónini á heysti í 1960. Leiðin gekk fyrst til sjómansheimið í Grimsby, har hann virkaði millum føroyskar sjómenn. Har var hann fleiri heyst á rað. Várið eftir fóru Johan og Amy til Reykjavíkar, fyri at taka við leiðsluni av føroysku Sjómansstovuni. Hetta starv røktu tey trúliga hvørt vár heilt fram til Sjómansheimið Ørkin varð vígt 2. juni 1991.

Arbeiðið í Íslandi, fyrst og fremst millum og fyri føroyingar, men eisini millum íslendingar, var eitt av hjartamálum hansara.

Í stríðnum fyri byggingini av sjómansheiminum Ørkini, var Johan ótroyttiligur.

At verða har, sum føroysku sjómenninir vóru, var Johan upptikin av. Mangur sjómaður og mong heim hava frá honum fingið eina vinarliga heilsan og eitt Guds orð.

Nevnast skal eisini, at tá ið føroysk skip í hópatali fóru til Bretlands at keypa sild síðst í 60-árunum og fyrst í 70-árunum, var Johan um heystarnar í Stornoway á Hebridunum, í Malaigh í Skotlandi og eitt skifti í Lerwich í Hetlandi.

Tá ið nótafiskiskapurin í 70-árunum og í 80-árunum tók seg upp í og út frá Hirtshals, komu nógvir føroyskir sjómenn til Hirtshals. Eisini har vitjaði Johan, og har var eina tíð ein føroyskur sjómanskvinnuringur. Hann vitjaði eisini fleiri ferðir á Bornholm tey árini, tá ið føroysku bátarnir fiskaði í Eystursjónum.

Um vetrarnar var hann íðin í arbeiðinum her heima. Hann vitjaði runt landið og talaði Guds orð. Hann var við til at stovna fleiri sjómanskvinnuringar og var íðin fyri at vitja og stimbra teir. Runavíkar Sjómansheim og missiónshúsið í Rituvík vóru eisini hjartamál hjá honum.

Við Johan er ein Harrans stríðsmaður farin.

Vit takka Gudi fyri Amy og Johan. Samstundis takka vit teimum hjartaliga fyri teirra stóra og trúfasta gerning Guds ríki til frama.

Æra verið minnið um Johan.

*Undir krossins merki stóðu gamlir menn,*
*undir krossins merki standa hetjur enn.*
*Skulu vit tá svíkja? Nei, vit standa stinn.*
*Breiðið krossins merki út!*

**Vegna Sjómansmissiónina**
**Torleif**

*Kelda: Trúboðin / Vitin*

## Dagurin

**20. september. Tobias.** Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá.
Navnið er hebráiskt og merkir *Guð er góður.*

**21. september. Matteus.** Ápostulin og evangelisturin Matteus. Halgisøgan veit at siga, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór Matteus til Etiopiu og boðaði evangeliið har. Er helst ein av teimum, sum á kirkjubøstólunum er avmyndaður við bók í hendi. Kongurin á Etiopiu læt hann taka av døgum.

Bíbilska navnið merkir G*uðs gáva.*

**22. september. Mauritius,** deyður í umleið 300. Rómverskur herhøvdingi, sum saman við 6666 hermonnum í liði sínum (tebansku legiónini), ið allir vóru kristnir, varð tikin av døgum.

Navnið merkir *blámaður*, tað sama 15. januar.

## Andlát

11. september
Petur Larsen, Vestmanna, ættaður av Eiði, 89 ár
12. september
Lina Simonsen í Norðadali, 79 ár
14. september
Arnold Sofus Petersen, ættaður úr Mikladali, 82 ár
15. september
Kurt Joensen, búsitandi í Fuglafirði, ættaður úr Kollafirði, 65 ár
Jóhanna Elina Davidsen, vanliga nevnd Hanna í Smiðjuni, Haldórsvík, 99 ár.
Betrina Joensen, Klaksvík, vanliga nevnd Betrina á Eiðunum,94 ár
16. september
Birita Jacobsen, Fuglafjørður, 66 ár
Jákup Hermansen, Leynar, 57 ár
17. september
Hartmann Carljot Hansen, Tvøroyri, 78 ár



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Páll Beder 50 ár

Fríggjadagin 19. september fylti Páll Beder á Argjum 50 ár. Páll er fuglfirðingur, sonur Ingu, f. Midjord, og Torkil Beder, bæði ættaði úr Vági og búsitandi í Fuglafirði.

Páll er føddur í Keypmannahavn og flutti til Føroyar sum eitt ára gamal. Búði á Viðareiði í tvey ár, har pápin var prestur, til familjan búsettist í Fuglafirði í 1956.

Eftir lokna skúlagongd sigldi Páll við trolaranum Ólavi Halga og arbeiddi á flakavirki, til hann í 1972 fór á Føroya Studentaskúla í Hoydølum.

Liðugur sum studentur í 1975 arbeiddi hann sum vikarur í skúlanum í Fuglafirði í eitt ár. Hann las á Støðisútbúgvingini í Havn, áðrenn hann fór til Noregs, har hann fekk sær útbúgving innan EDV. Síðan hevur hann arbeitt sum EDV maður á Elektron í meira enn 20 ár. Í dag er hann deildarleiðari á skattadeildini á Elektron.

Hann hevur í nógv ár verið virkin innan ítrótt og hevur m.a. verið við til at vunnið fleiri meistaraheitir við flogbóltsfelagnum Fleyr og landsliðnum í flogbólti.

Páll er giftur við Onnu, f. Olsen, úr Fuglafirði, tey búgva á Argjum og eiga børnini Fríðu og Finn.



## Anna Nolsøe Joensen 65

Sunnudagin 21. september fyllir Anna Nolsøe Joensen á Glyvrum 65 ár. Annað er ættað úr Vági, dóttir Ellu og Dion Emil Nolsøe, hon er yngst av fýra systkjum, hini eru: Niels Juul, Leif og Martha.

Hon giftist í 1964 við Arna Weihe Joensen, ættaður úr Porkeri. Tey búsettust á Glyvrum, har Arne starvaðist sum løgreglumaður. Anna og Arne fingu trý børn, tey eru: Annika, Henrik og Djóni.

Anna arbeiddi fyrstu árini í fiski og sum vaskikona og seinni í klædnahandlinum Hygg-Inn í Saltangará. Arne andaðist í 1994, 56 ára gamal. Sama árið keypti Anna klædnahandilin Shop-Inn á Glyvrum, og har hevur hon sína dagligu gongd.

Anna er virkin í kóri, hon hevur verið formaður í Eystankórinum í fleiri ár. Eisini hevur hon í fleiri ár verið virkin í fim-leikafelagnum Støkk á Glyvrum, og er hon har enn.

Føðingardagin er Anna burturstødd.

## Peter F. Christiansen 80



Mánadagin 22. september fyllir Peter Ferdinand Christiansen í Havn 80 ár. Peter F, sum hann verður nevndur millum manna, er havnarmaður, sonur Vestinu og Peter F. Christiansen.

Peter F hevur realprógv og handilsskúlaútbúgving. Hansara lívsstarv hevur verið stjórasessurin á Dimmalætting. Hann starvaðist tó fyrst í Landshandlinum, sum Løgtingið stovnaði í 1939 við tí endamáli at hava vørur á goymslu í krígstíð. Peter F starvaðist í hesum handlinum frá 1941 til 1947. Nøkur ár seinni varð handilin tikin av.

Í 1947 tók Peter F við sum stjóri á Dimmalætting, og tað starvið røkti hann líka til 1999. Hann var sera vandin í peningamálum, og tað hevur ljóðað, at tá Dimmalætting bygdi tað nýggja, stásiliga húsið á Smyrilsvegi var so væl húsað, at neyðugt var ikki at taka lán.

Peter F er eisini vælkendur úr politikki, bæði kommunalum og lands. Hann hevur verið býráðslimur í Havn 1965-70 og 76-84, og hann var bý-ráðsformaður 1968-69.

Hann varð valdur inn á ting fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymoy í 1966 og var tingmaður eitt valskeið. Í 1970 gjørdist hann landsstýrismaður og røkti hetta starv til januar 1975.

Peter F giftist við Paulu Solveig, f. Abrahamsen, ættað av Strondum. Tey eiga trý børn: Peter, sum býr í Keypmannahavn, John, sum býr í Havn, og Guðrið, sum býr í Keypmannahavn

## Jóhannes Álvheygg 80



Í gjár, fríggjadagin 19. september, fylti Jóhannes Álvheygg 80 ár. Hann er ættaður úr Haldórsvík, sonur Andreu úr Pállsstovu og Christian á Neystabø. Sum ungur fór hann til skips. Hann var við Normanner. Hann var eisini kokkur á víkarbátinum Snekkjusteini, tá hann fór á land á Skarði í 1948 og sakk.

Seinni fór Álvheygg - hann hevur vanliga verið nevndur við eftirnavni - til Havnar og arbeiddi í mong ár hjá Mariu Poulsen. Hann hevði eisini starv hjá Sam Olsen.

Í mong ár var Álvheygg eisini skrivari í KFUM í Havn. Sum skrivari skipaði hann fyri, at dreingir fóru at byggja sær smáttur á Trapputrøðni. Tað er tó ikki nøkur smátta, sum stendur har í dag, men handilshúsið SMS.

Kanska er Álvheygg kendastur sum Blákross-skrivari. Hann gjørdi nógv við fráhaldsarbeiðið, og tað var hann, sum stovnaði Blákross-stovuna.

Hann var deknur í Havnar Kirkju og limur í kirkjuráðnum. Hann var eisini formaður í Skúlaráðnum í fleiri valskeið, valdur av Sambandsflokkinum.

Hann giftist við Astrid Davidsen av Strondum, og tey fingu børnini Frantz og Andreu. Familjan býr í dag í Danmark.